Pætur Dam Jacobsen, Skála:

# - Eitt rættvíst úrslit

**Ein av nýggju monnunum á liðnum hjá Skála er ungi havnarmaðurin Pætur Dam Jacobsen, sum sunnudagin var í miðverjuni**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Pætur segði eftir dystin á Mølini sunnudagin, at eftir hansara tykki var javnleikur eitt rættvíst úrslit.

- Tað var ein javnur dystur, men tað vóru ikki nógvir málmøguleikar í dystinum, segði hann.

Ungi havnarmaðurin er komin inn á Skála úr AB saman við Bjarna Jørgensen, og hann dylur ikki fyri, at tað er fitt av muni at spæla í 1. deild í mun til 2. deild.

- Tempoið er væl hægri, og markeringarnar eru nógv tættari, og tú fært sjáldan frið til at hava bóltin, segði Pætur sunnudagin.

Sunnudagin var Pætur, sum áðurnevnt, í miðverjuni, men tað er eingin loyna, at hann trívist best á miðvøllinum.

- Ja, sjálvsagt vildi eg helst verið á miðvøllinum, men vit mangla fleiri mans í løtuni, og tí var eg í miðverjuni. Eg vil eisini nógv heldur verða har, enn sita úti á beinkinum, segði ein avgjørdur Pætur Dam Jacobsen.



*- Tempoið er væl hægri, og markeringarnar eru nógv tættari, og tú fært sjáldan frið til at hava bóltin, sigur Pætur um tað at spæla í bestu deildini*

*Mynd: Sofus*

EB/Streymur-Skála 0-0:

# Tamur oddadystur

**Fyrsti oddadysturin á árinum var á Eiði sunnudagin, tá ið sundalagsmenn høvdu vitjan av skálamonnum, men á vøllinum gjørdist tað ongantíð talan um nakað oddabrak**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bæði heimaliðið EB/-Streymur og gestirnir av Skála høvdu fingið fult í fyrsta umfarinum av Formuladeildini, og tí var talan um ársins fyrsta toppdyst, tá ið hesi bæði lið hittust á Mølini á Eiði sunnudagin. Rættuliga fitt av fólki var eisini komið saman til dystin, men tey fingu ikki serliga nógv fyri pengarnar.

## Lítið skipað spæl

Tað var lítið av tí poleraða fótbóltsspælinum at síggja á Mølini. Serliga í fyrra hálvleiki var bólturin fyri tað mesta á miðvøllinum, og tað var sjáldan, at nakar vandi var á ferð framman fyri málinum hjá annaðhvørt EB/Streymi ella Skála.

Sundalagsmenn vóru rættuliga skerdir til dystin, tí fleiri mans vóru ikki tøkir. Eitt nú var toppskjúttin í 1. deild í fjør, Sonni L. Petersen, ikki við, tí hann var sjúkur, og harumframt vóru hvørki Fróði Clementsen, Andrej Pacek ella Hallur Jacobsen við.

Eisini Skála manglaði onkrar leikarar. Pappírini hjá nýggju útlendsku spælarunum eru enn ikki komin í rættlag, so teir vóru ikki við, og Alexandur Johansen hevur heldur ikki verið at sæð á vøllinum enn í ár.

Hvørgin parturin megnaði at fáa gongd á nakað veruligt skipað spæl í fyrra hálvleiki, og teir fáu møguleikarnir, ið vóru, spurdust aloftast burtur úr tilvildarligum hendingum. Naskastu royndini hjá Skála syrgdi liðskiparin, Pauli G. Hansen, fyri, tá ið hann um miðjan fyrra hálvleik royndi seg við einum góðum skoti, sum Gunnar á Steig í aðru atløgu tó fekk fatur á.

Tað var tó heimaliðið, ið hevði størsta møguleikan, og hann fingu teir beint fyri steðgin. Ein bóltur bleiv sparkaður burtur úr verjuni hjá EB/Streymi og uppi í hinum endanum datt bólturin fyri føturnar á Hans Paula Samuelsen, sum gjørdist rættuliga leysur áraka brotsteigarmarkið nakað úti í vinstru síðu. Hans Pauli var knappur og royndi seg við skoti, sum brast í stongina og út av vøllinum.

## Vandamiklir deyðbóltar

Eftir steðgin kom eitt sindur meiri bit í liðini bæði, og eina løtu tóktist tað sum um, at skálamenn høvdu hug at taka leiðsluna. Skála hevði yvirvág í spæli fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, men teir høvdu ógvuliga ilt við at spæla seg til nakrar opnar málmøguleikar. Ein av orsøkunum til tað vóru vælleikandi miðverjarnir hjá heimaliðnum, Egil á Bø og Gert Hansen, sum høvdu sera gott tak á einsamalla framherjanum hjá Skála, Jonhard Frederiksberg, ið ongantíð av álvara fekk víst sínar dygdir.

Tær ferðirnar, ið vandi var á ferð framman fyri málinum hjá Gunnari á Steig, var, tá ið Skála hevði antin hornaspark ella fríspark langt frammi á vøllinum. Tá legði rumenin Iulian Florescu bóltarnar heilt inn í sjálvan málteigin, har tjúkt var í fólki, og burtur úr hesum spurdust fleiri vandamiklar støður. Tí einu ferðina beint eftir steðgin var um reppið, at hetta gav úrslit.

Florescu sendi eitt hornaspark úr høgra borði heilt inn í málteigin. Gunnar fekk ikki rættuliga fatur á bóltinum, og ein skálamaður beindi bóltin á kós inn í málið, men á sjálvari málstrikuni fekk Gert Hansen sparkað burtur av vandaleið.

Men so hvørt sum seinni hálvleikur leið, kom EB/-Streymur meiri við aftur í dystin. Heimaliðið tóktist vinna yvirtakið á miðvøllinum, har teir báðir hart arbeiðandi Knút Vesturtún og Marni Djurhuus stríddust, men hinvegin gekk tað sera striltið at nærkast málinum hjá Skála.

EB/Streymur hevði bóltin nógv, men teir megnaðu ongantíð av álvara at leggja trýst á Skála, hóast Hans Pauli Samuelsen sprellaði nakrar ferðir og fekk strítt seg til onkrar hálvar møguleikar, sum tó ikki góvu nakað.

Samanumtikið kann sigast, at bæði liðini sýndu vantandi hugflog, og dysturin var ein ógvuliga typiskur "tíðliga í kappingini"



*Talan var um ein sera tættan dyst, har málmøguleikarnir vóru fáir í tali, tá EB/Streymur og Skála spældu f*

## FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur-Skála 0-0**
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Esmar Eiðisgarð, Gert Hansen, Egil á Bø liðsk., Ólavur Poulsen - Hans Pauli Samuelsen, Knút Vesturtún, Marni Djurhuus, Bárður Olsen(Brian Olsen 59.) - Sorin Anghel, Leif Niclasen(Johan á Stongum 79.)
**Gult kort:** Knút Vesturtún 67,
**Skála:** Eugen Voda - Iulian Florescu, Rúni Rasmussen, Pætur Dam Jacobsen, Bárður Danielsen - Bogi Gregersen(Johannus Mikkelsen 82.), Hanus Thorleifsson, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen liðsk., Bjarni Jørgensen - Jonhard Frederiksberg (Rói Jacobsen 90.)
**Gult kort:** Nenad Stankovic 62, Bárður Danielsen 72.
**Dómari:** Georg Rasmussen
**Linjuverjar:** Jónleif Frederiksen og Regin Egholm

Egil á Bø, EB/Streymur:

# – Ikki nóg gott á heimavølli

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Liðskiparin hjá EB/-Streymi, Egil á Bø, var ikki heilt nøgdur við úrslitið sunnudagin.

- Tað er ikki nóg gott at fáa javnleik, tá ið vit eru á heimavølli. Hinvegin haldi eg, at sum dysturin var, so er javnleikurin eitt rættvíst úrslit, segði Egil á Bø beint eftir dystin.

Spurdur, um tað ikki er



*- Samanlagda úrslitið higartil hevur verið í lagi, men á heimavølli skulu vit helst hava trý stig, staðfesti Egil á Bø*

*Mynd: Sofus*

ein góð byrjan upp á kappingarárið hjá EB/Streymi at hava fýra stig eftir tveir dystir, sigur Egil á Bø.

- Samanlagda úrslitið higartil hevur verið í lagi,